## Óttast influensu

Nógvir danir bera ótta fyri at missa onkran av sínum kæru av beinkríminum Influansa A. Í einari kanning, sum kringvarpið DR hevur latið gera, svara 17 prosent av teimum spurdum, at tey bera ótta fyri at missa eina ommu, ein abba ella onkran heilsuveikan næstring av influensuni. Else Smith, sum arbeiðir í Heilsustýrinum, sigur við DR, at hon skilir væl, at fólk stúra fyri teimum gomlu og veiku, hóast hendan influensan ikki er verri enn tær, sum koma á hvørjum ári. Sambært Heilsustýrinum eru 750.000 danir í vandabólkinum, men nógv tey flestu verða frísk aftur.




## Tað var ikki hann

Fyri nøkrum døgum síðani helt indonesiska løgreglan, at hon hevði gjørt av við ein tann ringasta yvirgangsmannin í landinum, Nordin Mohammad Top, men nú hava DNA-royndir víst, at tað var ikki hann. Myndugleikarnir í Indonesia hava illgruna um, at Nordin Mohammad Top hevur skipað fyri fleiri av atsóknunum, sum al-Qaeda hevur framt har tey seinastu seks árini. Millum annað halda myndugleikarnir, at hann var høvuðsmaðurin aftan fyri atsóknina at tveimum hotellum í høvuðsstaðnum Jakarta fyri einum mánaði síðani. Sjey fólk deyðu.

# onnur fiskiveiðisamfeløg



*Jákup Sólstein, Óli M. Lassen og Auðunn Konraðsson leggja fram áhugaverd hagtøl yvir húkaveiði og fiskidagar*

Húkaflotin 1997-2009 Vanligir Fiskidagar undir Føroyum

| ár | Bruktir dagar Linuskip | Bruktir dagar útr u 15 brt | Bruktir dagar 4A Sm. Útr. Bátar | Bruktir dagar St. Útr. Bátar 4 | Brúktir dagar Húkaflotin | Húkaflotin Tillutaðir dagar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1997-98 | 2,469 | 17,558 | 2,624 | 3,986 | 26,637 | 35,613 |
| 1998-99 | 2,309 | 12,910 | 2,147 | 3,715 | 21,081 | 33,832 |
| 1999-00 | 2,207 | 13,290 | 2,255 | 3,995 | 21,747 | 33,832 |
| 2000-01 | 2,469 | 23,688 | 2,733 | 4,435 | 33,325 | 33,832 |
| 2001-02 | 2,494 | 22,330 | 2,454 | 4,450 | 31,728 | 33,832 |
| 2002-03 | 2,432 | 23,159 | 2,303 | 4,554 | 32,448 | 33,494 |
| 2003-04 | 2,186 | 18,337 | 2,184 | 5,108 | 27,815 | 32,825 |
| 2004-05 | 2,468 | 14,333 | 1,647 | 4,613 | 23,061 | 32,332 |
| 2005-06 | 3,141 | 14,689 | 1,200 | 1,717 | 20,747 | 30,416 |
| 2006-07 | 2,819 | 11,527 | 961 | 1,112 | 16,419 | 29,504 |
| 2007-08 | 2,446 | 8,225 | 581 | 1,035 | 12,287 | 28,915 |
| 2008-09 | *2192 | *4.851 | *386 | *994 | *8423 | 26,024 |







**Húkur í kreppu**
Jákup Sólstein, Óli M. Lassen og Auðunn Konraðsson siga, at fiskaprísirnir hava ført til kreppu hjá línu-og útróðrarflotanum.

- Miðalprísurin á toski er frá januar 2008 til januar 2009 fallin úr 24 krónum fyri kilo niður í 13 krónur fyri kilo. Hýsuprísurin er somuleiðis fallin úr 14,40 krónur fyri kilo niður í til 8,48 krónur fyri kilo. Við so lágum fiskaprísum er sjálvsagt, at royndin minkar munandi. Vánaligt gjaldføri í vinnuni hevur við sær, at skipini klára ikki fleiri túrar við negativum úrsliti. Eisini bíða skipini sum longst við at fiska kvotuna í Íslandi við vón um hækkandi prísir. Hetta hevur við sær, at nærum allur línuskipaflotin liggur.

Teir vísa á, at størsti parturin av útróðrarflotanum liggur eisini - við undantaki av bátunum sum royna eftir upsa við snellu.

- Fiskiskapurin eftir toski er á sama støði sum seinasta ár, men minni er til av hýsu, og royndin eftir hýsu er lítil. Samstundis, sum prísirnir eru lækkaðir, er talan eisini um, at tað í dag eru alt ov fáir fiskakeyparar til tosk og hýsu. Tí ivast vit í, um marknaðarprísurin í Føroyum er hin rætti.

**Greið niðurstøða**
Í 1984 vóru 277 feskfiskaskip.

- Taka vit aktivar útróðrarbátar omanfyri 15 BRT fyri 2009 og teir smáu trolbátarnar á landleiðini, eru umleið 110 skip og bátar í dag. Hetta merkir, at minkingin í skipum er omanfyri 60% frá 1984 til 2009. Í dag eru bert 15 útróðrarbátar eftir og 5 snellubátar. Tí er neyðugt at geva hesum bátum nøktandi umstøður at virka undir.

Teir vísa á, at í 1984 kundu øll skipi uttan undantak, ið royndu við Føroyar, fiska heilt inn at 12 fjórðinga markinum, men í dag er umleið 45% av landgrunninum uttanfyri 12 fjórðingar stongdur fyri trolveiði, samstundis, sum dagatalið hjá øllum skipabólkum er munandi skert. Men kortini er boðskapurin púra greiður: Minkið um dagatal og skip!

Jákup Sólstein, Óli M. Lassen og Auðunn Konraðsson siga seg tí stúra fyri, at Føroyar enda sum flestu onnur fiskiveiðusamfeløg.

- Vit kunnu bert hyggja at vesturstrondini í Jútlandi. Eitt nú í Esbjerg vóru umleið 700-800 skip, tá tey vóru flest. Í dag tað kanst tú telja tey á fingrunum, siga teir tríggir.